

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 09 - 2012

# Oljuvinna í fokus á FAROEXPO

Seinna hálvár av 2012 er ein sera áhugaverd tíð fyri føroyska samfelagið og ikki minst fyri føroyska vinnu. Hetta tíðarskeiðið verður aftur borað eftir kolvetnum á føroyska landgrunninum. Og hesi sannroynd hava fyrireikararnir av tí stóra stevnutiltakinum í Runavík, FAROEXPO eisini tikið hædd fyri. Teir hava rætt og slætt halgað ráðstevnupartin av tiltakinum til eina komandi føroyska oljuvinnu. Almenn ráðstevna Føroyar í Oljuvinnuni Ein týðandi partur av Faroexpo er almenna Faroexpo Ráðstevnan, sum verður hildin mikudagin 24. oktober kl. 13.00 til 16.30 í Løkshøll í Runavík. Heitið á ráðstevnuni í ár er Føroyar í Oljuvinnuni. Skráin, sum er løgd til rættis í tøttum samstarvi við FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólk, verður kunngjørd í næstum. Ráðstevnan er opin fyri almenninginum, meðan partenariatsparturin bert er fyri fyritøkum, ið hava fulla luttøku á Faroexpo. Høvuðsskráin fyri Faroexpo 2012 sæst nú eisini á www.faroexpo.fo. Sum skilst hevur tað eydnast fyrireikurunum at fáa fleiri spennandi oljufólk til Føroya at halda fyrilestur. Ein kemur úr Írlandi, ein úr Skotlandi og ein úr Noregi. Haraftrat verða eisini føroyskir fyrilestrarhaldarar. Oljan.fo kann eisini avdúka at lagt verður upp til eina sera spennandi og fjølbroytta ráðstevnu, har m.a. verður greitt frá oljutilgongdini í næstu grannalondum okkara. Eisini fara útlendsku fyrilestrarhaldararnir at geva sítt boð uppá, hvussu Føroyar kunnu læra av royndunum hjá øðrum. Sum nakað heilt serligt fer ein av útlendsku gestunum at tosa um risa møguleikarnar, sum liggja í nýggju vinnuni, Decommissioning, sum merkir avtøka/niðurtøka av gomlum oljupallum og øðrum útbúnaði í oljuvinnuni. Hetta er nakað, sum ídnaðurin í Noregi og Skotlandi og Hetlandi sær stórar møguleikar í. Hetta er eisini ein orsøk til at bretskir myndugleikar hava gjørt av at lække skattin hjá fyritøkum, sum fara inn í hesa nýggju vinnuna, ið verður mett at kunna skapa nógv arbeiðspláss.

Mett verður at tað komandi 30 árini fara at liggja 3000 milliardir krónur í hesi vinnu. Kunnu Føroyar gerast partur av henni? Hetta er ein av áhugaverdu spurningunum, sum fer at verða reistur á ráðstevnuni. Støðugt vaksandi áhugi Undirtøkan fyri at luttaka á vinnustevnuni Faroexpo er annars alsamt vaksandi. Í mun til somu tíð í fjør, hava nógv fleiri fyritøkur og stovnar meldað til Faroexpo, sum verður hildin frá 22.  24. oktober. Hetta er áttanda árið á rað, at stóra tiltakið verður hildið í Runavík. Talan er um eitt serstakt vinnuligt konsept, ið er samansett av partenariati, ráðstevnu og mentan. Faroexpo er størsta og einasta vinnuliga tiltak av sínum slagi í Føroyum. Vinnustevnan er eitt sera gott høvi hjá føroyskum og útlendskum fyritøkum og stovnum at knýta vinnulig sambond. Til ber at melda til Faroexpo beinleiðis á netinum. Talið av luttakarum er vaksið hvørt ár, og verður talið á luttakandi á Faroexpo 2012 væntandi eisini nakað hægri enn í fjør. Tí ynskja fyrireikararnir at hava yvirlit yvir allar luttakarar so tíðliga sum møguligt, fyri at fyrireika so viðkomandi fundir sum gjørligt. Partenariat Partenariatið verður hildið í ítróttarhøllini í Runavík týsdagin 23. oktober og fyrrapart mikudagin 24. oktober. Eitt Partenariat er eitt afturlatið forum, har tilmeldaðu luttakararnir nýta høvi at skapa vinnulig sambond gjøgnum skipaðar fundir. Partenariatið setir fokus á fyritøkur og stovnar innan ymiskar vinnugreinar. Tey, sum velja at luttaka á partenariatinum, fáa atgongd til luttakaralistan og harvið møguleikan at bíleggja fundir við aðrar luttakarar. Stutt áðrenn Faroexpo verður eitt yvirlit yvir fundir sent luttakarunum, soleiðis at til ber at fyrireika seg til hvønn einstakan fund og gera broytingar, um neyðugt. Fyriskipan Tað er fyritøkan VRG í Saltangará, sum er høvuðssamskipari av Faroexpo (22. til 24. oktober) og Mentanarvikuni í Runavík (21. til 28. oktober). Høvuðsstuðlar hjá samlaða tiltakinum eru Bank Nordik og Runavíkar kommuna. Harumframt hevur Faroexpo nakrar sonevndar expo-stuðlar, hesir eru Statoil Føroyar, Bakkafrost og Atlantic Supply Base. Myndir Símun Hammer, stjóri í Virkisráðgeving og Rannvá Troest, samskipari á vitjan hjá FOÍB á Bryggjubakka í Havn fyri at fáa íblástur til komandi oljuráðstevnuna. Klaksvíkar Sleipistøð á Faroexpo Niðurtøka av gomlum oljupallum verður ein risastór vinna í grannalondunum komandi mongu árini.